**Frágreiðing viðvíkjandi roknskapareftirliti av innkomnum ársfrásagnum í 2022**

Frágreiðingin viðgerð úrslitið av roknskapareftirlitinum av innkomnum ársfrásagnum í 2022.

Tann 31. desember 2021 vóru 3.727 feløg skrásett í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya. Eitt sindur undir helvtina av hesum feløgunum høvdu grannskoðara skrásettan, meðan eitt sindur yvir helvtina vóru skrásett uttan grannskoðara.

Skráseting Føroya ger hvørt ár eftirlit við ársfrásagnunum hjá skrásettu feløgunum. Árliga roknskapareftirlitið er býtt í tvey. Eitt móttøkueftirlit, ið hevur til endamáls at lúka mest sjónligu feilirnar burtur, og síðani stakroyndir samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini, sum er ein gjølla gjøgnumgongd av útvaldum ársfrásagnum.

Endamálið við roknskapareftirlitinum hjá Skráseting Føroya er fyrst og fremst at tryggja, at tær ársfrásagnir, sum feløg senda inn, eru rættar. Harumframt verður kannað um aðrir upplýsingar, sum felagið hevur fráboðað til Skráseting Føroya samsvara við ársfrásøgn felagsins. Tað vil siga viðtøkur, fráboðan um eigarar, grannskoðaraviðurskiftir og hvussu felagið annars er skrásett í partafelagsskránni.

**Úrslit frá stakroyndunum samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini:**

Í 2022/2023 eru 65 ársfrásagnir frá roknskaparárinum 2021 kannaðar sum stakroyndir. Harav 30 við grannskoðara skrásettum í skipanini hjá Skráseting Føroya og 35 uttan grannskoðara skrásettan í skipanini hjá Skráseting Føroya. Hetta er áleið 1,7% av samlaðu feløgunum.
Av teimum 35 feløgunum, sum hava valt grannskoðan frá, hava 17 fingið hjálp frá grannskoðara at seta roknskapin upp.
Onki av feløgunum hevur grannskoðaraváttan um gjøgnumgongd (review).

Niðanfyri standandi talva vísir fordeilingina av viðurskiftum sum Skráseting Føroya hevði viðmerkingar til í fimm bólkar:

| Viðurskifti | Ársfrásagnir |
|---|---|
| 1. Nýttur roknskaparháttur | 1 |
| 2. Forklárandi notur | 6 |
| 3. Manglandi partar av ársfrásøgnini | 4 |
| 4. Fráboðan til Skráseting Føroya manglar | 6 |
| 5. Partaeigaralán | 2 |

**Nýttur roknskaparháttur** – Sambært ársroknskaparlógini skulu ársfrásagnir millum annað innihalda nýttan roknskaparhátt. Nýttur roknskaparháttur skal inni halda viðkomandi

upplýsingar um innrokningarhátt og mátigrundarlag sum eru nýtt fyri upphæddirnar í fíggjarjavna, rakstrarroknskapi, notum og møguligari leiðslufrágreiðing. Harundir eisini avskrivingarhátt fyri støðisøgn.

Skráseting Føroya ger viðmerkingar til ársfrásøgina um fíggjarstøða og rakstur ikki samsvara við tað sum er lýst í  nýttum roknskaparhátti, hetta bæði tá ov lítið er lýst og um ov nógv viðurskifti verða lýst í nýttum roknskaparhátti, sum ikki eru viðkomandi fyri felagið.

Í hesum roknskapareftirlitinum hevur Skráseting Føroya gjørt vegleiðingarskriv til eitt felag tí ov nógvir manglar vóru í nýttum roknskaparhátti. Hetta felagið var ikki grannskoðað.

**Forklárandi notur** – Skráseting Føroya er í sambandi við eftirlitið komin fram á seks ársfrásagnir, har viðmerkingar vóru til vantan av upplýsingum í notunum. Fýra av hesum høvdu ikki upplýst um virksemi felagsins í roknskaparárinum, men bert endurgivið endamál felagsins. Sambært § 76a í ársroknskaparlógini skal felagið lýsa høvuðsvirksemi felagsins í ársfrásøgnini. Hetta í notunum ella í leiðslufrágreiðingini um felagið hevur eina slíka.

Eitt av feløgunum hevði ikki upplýst um tilknýtt feløg í notunum og eitt felag hevði ikki upplýst um broytingar í felagskapitali felagsins seinastu 5 árini.

**Manglandi partar av ársfrásøgnini** – Fýra ársfrásagnir høvdu manglar. Herundir dagfesting og navn á fundarstjóra á forsíðuni á ársfrásøgnini, eina leiðsluátekning, sum ikki uppfylti krøvini í ársroknskaparlógini og manglar í fíggjarstøðuni. Ein ársfrásøgn hevði so mikið nógvar manglar, at hon ikki kundi metast at vera ein ársfrásøgn eftir ársroknskaparlógini. Hetta felagið fekk boð um at lata nýggja ársfrásøgn inn, meðan hini trý fingu vegleiðingarskriv um at fáa viðurskiftini í rættlag í næstu ársfrásøgn.

**Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** – Í sambandi við eftirlitið kannar Skráseting Føroya eisini um upplýsingar, sum eru skrásettir í partafelagsskránni eru rættir. Harundir til dømis grannskoðaraviðurskifti, viðtøkur og fráboðan um eigarar. Í 2022/2023 er Skráseting Føroya komin fram á seks viðurskifti sum ikki vóru í lagi. Fýra viðvíkjandi eigaraskránni og tvey viðvíkjandi grannskoðaraviðurskiftum.

Tvey feløg høvdu valt grannskoðara frá, men hetta var ikki fráboðað til Skráseting Føroya og stóðu tey tí enn skrásett við grannskoðara í partafelagsskránni.

Tvey av feløgunum høvdu ikki latið fráboðan um eigarar inn. Hóast freistin at lata inn var 1. september 2022. Tvey av feløgunum høvdu latið fráboðan um eigarar inn, men hendan var ikki røtt. Leggjast kann í hesum førinum afturat at 10% av feløgunum sum eru skrásett í partafelagsskránni enn ikki hava latið fráboðan um eigarar inn til Skráseting Føroya, hóast freistin at lata inn var 1. september 2022.

**Partaeigaralán** – í sambandi við eftirlitið er Skráseting Føroya komið fram á tvey feløg, sum høvdu partaeigaralán. Partaeigaralán er millumrokning ímillum felagið og leiðslu, eigarar ella onnur nærstandandi hjá felagnum. Partaeigaralán eru ólóglig og skulu afturgjaldast við rentum.

Partaeigaralánini, sum Skráseting Føroya er komin fram á í sambandi við roknskapareftirlitið hesaferð, eru bæði hjá feløgum sum eru grannskoðaði og hava grannskoðararnir í báðum førum havt viðmerkingar um partaeigaralánini í grannskoðaraátekningini. Í báðum førum var afturgjaldsavtala við rentum gjørd. Skráseting Føroya hevur biðið um váttan frá leiðsluni í feløgunum og grannskoðarum felagsins um, at partaeigaralánini eru afturgoldin feløgunum við lógarkravdum rentum.

Býtt yvir tey feløg sum hava valt grannskoðan frá, fingið roknskaparhjálp og eru grannskoðað er fordeilingin hendan:

| | | Frával | Roknskapar hjálp | Grannskoðað |
|---|---|---|---|---|
| **1.** | **Nýttur roknskaparháttur** | **6%** | **0%** | **0%** |
| **2.** | **Forklárandi notur** | **17%** | **0%** | **10%** |
| **3.** | **Manglandi partar av ársfrásøgnini** | **22%** | **0%** | **0%** |
| **4.** | **Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** | **28%** | **12%** | **3%** |
| **5.** | **Partaeigaralán** | **0%** | **0%** | **7%** |

Úrslitið vísir, at ársfrásagnir, sum eru grannskoðarar og hava fingið hjálp frá grannskoðara at seta roknskapin upp, í flestu førum hava nýttan roknskaparhátt í lagi, meðan nøkur av teimum, sum velja grannskoðan og hjálp frá grannskoðara frá, hava feilir ella manglar í nýttum roknskaparhátti.

Í samband við forklárandi notur hava 17% av teimum, sum hava frávalt grannskoðan fingið viðmerkingar frá Skráseting Føroya og 10% av grannskoðaðu feløgunum. Tað hava í hesum eftirlitinum ikki verið viðmerkingar til forklárandi notur hjá teimum sum hava fingið hjálp frá grannskoðara at seta roknskapin upp.

Tær ársfrásagnirnar sum eru grannskoðaðar og hava fingið hjálp frá grannskoðara til uppsetan mangla ikki partar av ársfrásøgnini. Hetta hendir tó í fleiri førum hjá feløgunum, sum hava frávalt grannskoðara. Í hesum eftirlitinum er Skráseting Føroya komin fram til at 22% av ársfrásøgnunum, sum hava frávalt grannskoðara, hava manglar.

Fleiri feløg mangla at fráboða frával av grannskoðara og eigaraviðurskifti til Skráseting Føroya, hetta talið er hægst fyri tey sum hava frávalt grannskoðan og roknskaparhjálp, eitt sindur lægri fyri tey sum hava fingið hjálp at seta roknskapin upp og heilt lágt fyri grannskoðaði feløg. Hóast okkurt av grannskoðaðu feløgunum manglar at fráboða okkurt, so er tað ábyrgdin hjá leiðsluni í felagnum at fráboða til Skráseting Føroya.

Skráseting Føroya hevur í sambandi við eftirlitið fingið kunnleika til tvey partaeigaralán. Hesi eru bæði hjá grannskoðaðum feløgunum og í báðum førum er upplýst um hetta í grannskoðaraátekningini. Tað, at eingi partaeigaralán eru á síggja í ársfrásagnum, sum ikki eru grannskoðarar, kann vera tí, at grannskoðarar halda sína skyldu at upplýsa um partaeigaralán, meðan feløg sum ikki verða grannskoðaði møguliga ikki upplýsa um hesi tøl.

**Samanumtøka**

Í sambandi við roknskapareftirlitið kann Skráseting Føroya vísandi til § 161 í ársroknskaparlógini: 1) vegleiða, 2) átala og 3) krevja, at feilir verða rættaðir.

Í sambandi við eftirlitið av grannskoðaðu ársfrásagnunum hevur Skráseting Føroya valt at vegleiða um viðurskifti hjá trimum feløgum.

Av feløgunum sum ikki eru grannskoðaði hevur Skráseting Føroya sent vegleiðingarskriv til fimm feløg og biðið um nýggja ársfrásøgn frá einum felagi.

Harumframt hava seks feløg fingið boð um, at tey mangla at senda fráboðan til Skráseting Føroya um broytingar í felagnum. Hetta viðv. t.d. grannskoðarabroyting og eigaraviðurskiftum.

Umframt stakroyndirnar, hevur Skráseting Føroya í sambandi við móttøkueftirlitið við ársfrásagnum, sum eru móttiknar í 2022 biðið 18 feløg um at lata inn nýggja ársfrásøgn, tí hon ikki lýkur treytirnar í ársroknskaparlógini. Harav fýra sum ikki luku treytirnar at velja grannskoðara frá og ein sum ikki var á føroyskum ella donskum máli, sum er krav sambært ársroknskaparlógini.

Av hesum vóru 13 íverksetarafeløg og fimm smápartafeløg, har eitt felag var grannskoðað.
Í sambandi við móttøkueftirlitið hevur Skráseting Føroya eisini stovnað fýra mál viðv. ólógligum partaeigaraláni.